# Lívið í Nuuk

**Tað hendir mangt og hvat í Nuuk í Grønlandi, og fólk eru kvik at melda. Kristian Dahl, sum í løtuni er løgreglumaður í Nuuk, tekur her fram nøkur brot úr døgnrapportini hjá løgregluni í Nuuk fyri samdøgrið leygardagin 17. juli**




Kristian Dahl

**Kl. 00.24:** En 14 ára gomul genta datt niður av 5. hædd í Blok P í miðbýnum í Nuuk. Gentan fekk stóran skaða og var flutt á sjúkrahúsið. Hon var seinni flutt til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið. Kannað verður, hví gentan datt útav. Einki bendir á, at nakar annar var uppií hendingini.

**Kl. 00.40:** Bilur farin útav vegnum í Nuussuaq uttan fyri býin í Nuuk. Ein kvinna var í bilinum, og varð hon skuldsett fyri rúsdrekkakoyring.

**Kl. 00.51:** Húsaófriður í einari íbúð. Ein gestur var blivin illur í sær og var blivin harðligur. Løgreglan fór á staðið, men fólkið var rýmt, áðrenn løgreglan kom.

**Kl. 01.15:** Fráboðan um ein leysan hund, sum sær út til at hava nógva pínu og er møguliga skaddur. Ein djóralækni boðsendur at kanna hundin. Vísti seg ikki at hava nakran skaða, og varð hundurin latin til djórainternatið.

**Kl. 02.23:** Fráboðan um at ein maður sparkar á úthurðina og er ólátaður uttan fyri eina íbúð. Maðurin rýmdi, áðrenn løgreglan fekk hendur á honum.

**Kl. 03.00:** Kvinna fráboðar, at pápi hennara, sum er fullur, hóttir hana í íbúðini. Hon hevur stongt seg inni í sovikamarinum. Løgreglan fór til staðið, men tá var maðurin avdottin. Kvinnan fór aðrastaðni at sova hesa náttina.

**Kl. 03.59:** Kvinna fráboðar, at sonur hennara er í ferð við at knúsa innbúgvið í íbúðini. Løgreglan fór til staðið, men tá valdaði friður, og tey skuldu sjálvi avgreiða málið.

**Kl. 05.13:** Tveir bardagar í miðbýnum, sum løgreglan fór til og fekk steðgað. Eingin fekk mein í tilburðunum.

**Kl. 06:35:** Fráboðan um ein fullan mann, sum stóð uppi á rimaverkinum á svalagongdini í Blok P á 5. hædd. Vandi fyri at maðurin skuldi detta útav. Løgreglan fór til staðið, men maðurin var sjálvur farin niður av aftur, og vandin var av.

**Kl. 07:00:** Fráboðari hevur illgruna um, at ein reyður bilur koyrir í býnum við rúsdrekkaávirkaðum førara. Løgreglan fann stutt eftir bilin parkeraðan, og eingin førari at síggja.

**Kl. 07.36:** Ein ókendur maður er komin inn á bústaðin hjá einari familju. Maðurin tykist í ørviti. Løgreglan fór eftir manninum.og koyrdi hann til hús.

**Kl. 07:52:** Herverk framt á ein rút í Brugseneeraq (lítlu Keypssamtøkuni) í miðbýnum. Nøkur fólk høvdu fingið hendur á gerningsmanninum. Maðurin tikin inn á politistøðina, har hann bleiv skuldsettur fyri herverk.

klæðini. Málið var loyst í sátt og semju.

**Kl. 12.55:** Maður tikin í handlinum Pisiffik, har hann hevði stolið eina fløsku av víni. Maðurin tikin við á politistøðina, har hann fekk eina bót.

**Kl. 13.50:** Fráboðan um, at full fólk eru til ampa uttan fyri matvøruhandilin Pisiffik í Nuussuaq. Løgreglan koyrdi ein túr í økinum, og tað fekk fólkini at vera friðarlig.

**Kl. 14.05:** Fráboðan um, at ein full genta liggur nærhendis einum skúla í Nuussuaq. Løgreglan fekk gentuna upp á beinini og kláraði hon seg sjálva víðari.

ein maður hevur stolið matvørur fyri 72,- kr. Maðurin fluttur á politistøðina, har hann fekk bót.

**Kl. 18.10:** En maður sparkaði á ein politibil, meðan bilurin stóð parkeraður í miðbýnum. Ein bugla var komin í hurðina. Vitni høvdu sæð mannin fremja herverkið og vístu tey á, at maðurin var farin inn í matvøruhandilin Pisiffik nærhendis. Løgreglan handtók mannin, sum varð skuldsettur fyri herverk og somuleiðis fær eitt endurgjaldskrav fyri skaðan, hann gjørdi á politibilin.

**Kl. 19.50:** Ein maður vendi sær til politistøðina og fráboðaði herverk, tí ein kvinna hevði brotið ein rút í íbúðini hjá fráboðaranum. Gerningskvinnan verður boðsend til avhoyringar.

**Kl. 22.45:** Fráboðan um at ein full og ómøgulig kvinna er gingin amokk á bingjuøkinum við bryggjarííð. Løgreglan fór til staðið, har tað bleiv staðfest, at kvinnan hevði etið eina ókenda nøgd av tablettum. Sjúkrabilur boðsendur, og kvinnan varð koyrd á sjúkrahúsið.

**Kl. 22.48:** Fráboðan um at fýra smá børn, yngsta um tvey ár, hava gingið einsamøll uttandura í gamla býarpartinum í góðan hálvan tíma. Sosialu myndugleikarnir boðsendir og skuldu taka sær av børnunum og royna at finna fram til foreldrini.

**Kl. 22.56:** Fráboðan um at graffiti er málað á Blok 6 og Blok 7. Illgruni til nøkur ungfólk. Mál skrivað um herverk.



**Kl. 09:42:** Ein fullur maður liggur avdottin árakað "Brettinum" (har veiðumenn selja grønlendskan mat) í Nuussuaq. Løgreglan fór á staðið og fekk lív í mannin, sum helt leiðina fram sjálvur.

**Kl. 10.55:** Fráboðan um, at tvey børn, 9 og 11 ára gomul, vóru einsamøll heima, meðan mamman gekk full í býnum. Sosialu myndugleikarnir fráboðaðir og skuldu taka sær av børnunum.

**Kl. 12.20:** Ein kvinna ynskir hjálp frá løgregluni at fara eftir nøkrum av klæðum sínum, sum eru í íbúðini hjá fyrrverandi sambúgva hennara, tí hann forðaði henni í at fáa

**Kl. 15.50:** Maður hevur stolið ein pakka av Mattak (hvølja av náhvali) í Brugsen. Maðurin fluttur á politistøðina og fekk bót.

**Kl. 16.55:** Fráboðan um at onkur selur hash uttan fyri Brugsen. Løgreglan patruljeraði í økinum og gjørdi fyribyrgjandi arbeiði.

**Kl. 17.40:** Fráboðan frá Kamik Center Marked um, at ein maður er tikin, sum hevur stolið tvær dósir av spaghetti. Maðurin fluttur á politistøðina, har hann fekk bót.

**Kl. 17.55:** Aftur ein fráboðan um stuldur, hesaferð frá matvøruhandlinum Pisiffik í Nuussuaq, har

**Kl. 20.37:** Fráboðan um at eldur er í einar trappugongd í Blok P. Sløkkiliðið boðsent. Vísti seg at vera nøkur ungfólk, sum høvdu sett eld á ein plastrút, sum var smeltaður. Lítil og eingin eldur og ikki brúk fyri sløkkiliðnum.

**Kl. 21.40:** Fyri 5. ferð í dag kom fráboðan um stuldur úr handli. Hesa ferð var tað aftur úr handlinum Kamik Center Marked, har ein maður hevði stolið vørur fyri 63,50 kr. Maðurin fluttur á politistøðina, har hann fekk eina bót.

**Kl. 23.37:** Fráboðan um at ein bilur koyrir við møguliga rúsdrekka ávirkaðum førara. Løgrelgan fann seinni bilin parkeraðan uttan nakran førara í bilinum.

**Kl. 23.54:** Íbúgvar í einum íbúðarblokki klaga um, at ein íbúgvi í blokkinum larmar og er støðugt til ampa fyri hini fólkini í blokkinum. Hetta er ikki fyrstu ferð, at sami íbúgvi er til ampa. Løgreglan tosar við mannin. Annars eru íbúgvarnir vístir til at klaga til felagið, ið eigur íbúðarblokkin.